Landsbanki Føroya
Governmental Bank

Føroya Løgting
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
FO-110 Tórshavn

Tórshavn, 28-10-2004
Jnr. 2003-12-154

Avtøka av landsbankanum sum sjálvstøðugur stovnur

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur avgjørt at seta stýrisbólk við uppgávuni at fremja eina samanlegging av landsbankanum og hagstovuni. Sambært arbeiðssetninginum skal landsbankin avtakast sum sjálvstøðugur stovnur við eginfígging, og skal í framtíðini fáa sína játtan á fíggjarlógini innan karmin hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Harumframt verður landsbankin umskipaður til ein stovn undir politisku fyrisitingini hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Nevnd og umsjónarráð landsbankans halda, at verður hendan ætlan framd í verki, so er hetta at avtaka landsbankan sum óheftan stovn. Nevnd og ráð halda, at politiskt óhefta støðan hevur alstóran týdning fyri virkisføri bankans og møguleikarnar at útinna tær uppgávur, sum landsbankin er settur at røkja.

Nevndin og ráðið skulu við hesum skrivi greiða frá, hví óhefta støða bankans er avgerandi fyri, at landsbankin fær røkt sínar samfelagsuppgávur á ein fulldyggan hátt.

1. Virkisføri landsbankans
Landsbankin hevur tríggjar høvuðsuppgávur: 1) At vera almennur banki, 2) At virka fyri jøvnum búskaparvøkstri, og 3) At varðveita trygg fíggjarviðurskifti í Føroyum.

1.1. At vera almennur banki
Landsbankin hevur sum uppgávu at skipa stuttfreistaða gjaldføri landskassans, so hann altíð hevur tøkan pening til gjaldingar sínar.
Hann skal somuleiðis útvega landskassanum so gott avkast sum gjørligt av tiltaksgjaldførinum (minstainnláninum). Hetta verður gjørt við at gera íløgur í virðisbrøv. Av tí, at politisku myndugleikarnir kunnu setast undir trýst, um hvar og hvussu tiltaksgjaldførið skal plaserast, eigur henda uppgáva at verða røkt av einum fakligum stovni uttan fyri málsræðið hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Bankin skipar eisini fyri lántøku til landskassan. Tá landskassin tekur upp lán frá altjóða lánsmarknaðunum er ein av uppgávunum at gera metingar av væntaðu gongdini í føroyska búskapinum. Tað er neyðugt, at slíkar metingar verða gjørdar av stovni, sum arbeiðir við fíggjarmarknaðinum, og sum er óheftur av politisku myndugleikunum fyri at tær kunnu hava neyðuga trúvirðið.

Müllers Hús – Gongin
P.O.Box 229
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 318305
Fax +298 318537
landsbank@landsbank.fo
http://landsbank.fo

1.2. At virka fyri jøvnum búskaparvøkstri
Hendan uppgávan umfatar ma. at gera metingar um førdi fíggjarpolitikkurin virkar konjunkturjavnandi ella konjunkturviðgangandi. Skal landsbankin kunna gera óheftar metingar av politikki landsstýrisins, er neyðugt, at hann er óheftur av politisku fyrisitingini.

1.3. At varðveita trygg fíggjarviðurskifti í Føroyum
Føroysku lánsveitingarnar fara sum heild fram innanlendis, og Føroyar hava tí ein sjálvstøðugan kredittmarknað. Altjóða kanningar vísa á, at størsta einstaka orsøk til fíggjarkreppur er, at samlaðu lánsveitingarnar gerast ov stórar í mun til BTÚ. Fyri at virka fyri endamálinum at varðveita trygg fíggjarviðurskifti í Føroyum, ger landsbankin yvirlit yvir gongdina í útlánum og innlánum, og fylgir annars gongdini um útlán peningastovnanna gerast ov stór í mun til BTÚ. Førdi búskaparpolitikkurin kann eisini ávirka trygdina í fíggjarskipanini. Eftirlitið fevnir tí eisini um metingar av førda búskaparpolitikkinum. Tað er umráðandi, at landsbankin er óheftur av politisku myndugleikunum í hesi uppgávu, so hann kann gera partsleysar(objektivar) og trúverdugar metingar av búskaparpolitikki landsstýrisins.

Nevndin undrast á, at landsstýrið leggur alstóran dent á at fáa innlit í eftirlit við einstøku peningastovnunum, sum fíggjareftirlitið fremur, samstundis sum landsstýrið ætlar at skerja heildareftirlitið við fíggjarsektorinum, sum landsbankin útinnir. Innlit í stovnseftirlit gevur landsstýrinum kunning um støðuna hjá einum peningastovni, tá hann er um at fara á húsagang, og landsstýrið bert hevur valið millum at lata stovnin fara á húsagang ella innskjóta nýggjan eginpening.

Landsbankin hevur til uppgávu at eygleiða samlaðu kredittveitingarnar í samfelagnum, og kann sostatt viðvirka til at forða fíggjarkreppum í góðari tíð.

Nevndin undrast serliga, at landsstýrið skerjir heildarkreditteftirlitið, nú fíggjarligu útlitini eru ótryggari.

2. Altjóða faklig ráðgeving
Tann ráðgeving landsstýrið fekk sær uttanífrá, tá landsbankin varð stovnaður, vísti á, at stovnar við tjóðbankauppgávum eru óheftir. Síðan hava búskaparfrøðilig gransking og altjóða ráðgeving javnan víst á fyrimunirnar við meira sjálvstøðugum tjóðbankum. Gongdin seinastu nógvu árini hevur tí verið, at ríkismyndugleikar hava gjørt tjóðbankar støðugt meira sjálvstøðugar. Um landsbankin verður avtikin sum sjálvstøðugur stovnur, so er hetta beint móti altjóða ráðgevingini seinastu 20 árini.

3. Breiða politiska semjan
Tann breiði politiski meirilutin, ið stovnaði landsbankan, legði í viðmerkingunum til landsbankalógina dent á, at tað er neyðugt hjá londum við sjálvstøðugari ábyrgd fyri búskaparpolitikki teirra at hava ein landsbanka. Hetta hevur verið breið semja um í Føroyum seinastu 26 árini. Viðmerkjast skal eisini, at í tí uppskotinum til nýggja grundlóg fyri Føroyar, sum tann av løgtinginum valda grundlógarnevndin arbeiðir við, verður mælt til at gera landsbankan meira sjálvstøðugan. Tískil fer løgtingið frá einari breiðari politiskari semju, um ætlan landsstýrismansins í fíggjarmálum verður framd í verki.

Niðurstøða

Nevndin heldur, at hølisfelagsskapur millum landsbankan og hagstovuna kann styrkja fakliga umhvørvið og samarbeiðið millum stovnarnar báðar.

Hinvegin heldur nevndin, at samfelags- og trygdaruppgávur landsbankans verða best røktar av stovni, sum loysir sínar uppgávur á fakliga væl grundaðum støði og sum er fíggjarliga sjálvstøðugur og politiskt óheftur. Nevndin heldur, at vandi er fyri, at uppgávurnar verða munandi verri loystar, um tær skulu røkjast av einum stovni, sum er partur av politisku fyrisitingini.

Nevnd og ráð landsbankans skulu tí við hesum staðiliga mæla politisku flokkunum frá at avtaka landsbankan sum sjálvstøðugan og óheftan stovn, og heita á politisku flokkarnar um heldur at virka fyri at styrkja sjálvstøðu og óhefti landsbankans.

Nevnd og umsjónarráð landsbankans